Tíðindablaðið
**sosialurin**
Internet: www.sosialurin.fo

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
**Marknaðadeild:** Jonhard Hammer, Dagbjørt S. Hansen, Hjørdis Árnadóttir
**Blaðfólk:** Áki Bertholdsen, Turið Kjølbro, Jústinus Eidesgaard, John Johannessen, Sveinur Tróndarson, Eyðun Klakstein, Edvard Joensen, Stefan í Skorini
**Ítróttur:** Jákup Mørk
**Myndamenn:** Jens Kristian Vang, Álvur Haraldsen
**Útgevari, uppseting:** Sp/f Sosialurin
**Bústaður:** Argjavegur 26, Argir
**Postadr:** Postsmoga 76, 110 Tórshavn
**Telefon:** 311820 **Fax.** 314720
**e-mail:** post@sosialurin.fo
**Lýsingar:** lysing@sosialurin.fo
**Prent:** P/F Prentmiðstøðin

## Tjóðveldið og NATO – ein kúvending uttan líka

***Oddagrein***

RÆTT er, at verjumál er danskt málsøki, og at danska stjórnin kundi gera, sum hon vildi, tá hon gav NATO og amerikumonnum loyvi at leggja støðir sínar her á landi í fimti- og sekstiárunum. Danska stjórnin kundi somuleiðis leggja sektin á samtyktirnar á Føroya Løgtingi um, at Føroyar skuldu haldast uttan fyri allar hernaðarsamgongur, og at hermenn ikki skuldu vera knýttir at hesum støðum.

VIT kunnu partvíst geva formanni Tjóðveldisfloksins rætt í tí hann førir fram í Sosialinum týsdagin, men vit kunnu ikki geva honum rætt, tá hann skuldsetir føroyskar politikkarar fyri at taka undir við stjórnini, og fyri ikki at sýna ábyrgd. Formaðurin í Sambandsflokkinum segði víst, at landsstýrið hevði einki at gera við hetta málið, tí tað er danskt málsøki, men formaðurin í Javnaðarflokkinum fýltist hinvegin á, at málið – fyrispurningurin um fundin við George Robertsson – ikki varð lagdur fyri uttanlandsnevndina, sum skal kunnast um øll viðurskifti í fullveldistilgongdini. Tað er einki galið í tí, at landsstýrið kannar og spyr seg fyri um støðu Føroya í verjuhøpi, um vit skipa Føroyar sum fullveldisríki, men avtalaðar mannagongdir eiga at haldast.

TÁ alt hetta er sagt, skal leggjast afturat, at tað er einki annað enn margháttligt og láturligt – hóast málið er av teimum mest álvarsomu – tá tjóðveldismenn tosa um møguligan limaskap í Partnership for Peace. »Peace«…tað ljóðar gott, men hetta er felagsskapur undir NATO: Og øll, sum minanst aftur í seksti- ella sjeytiárini, kenna áhaldandi herrópið hjá tjóðveldismonnum »Hervaldið av landinum«. Eitt herróp, sum varð málað á garðar og veggir og mangan brúkt í blaðgreinum – ja, mundi tað ikki breiða seg yvir fleiri teigar í Fjúrtanda viðhvørt?

VÍST broytast tíðir. Nýtt fólk kemur til. Men løgið er, at tjóðveldisfólk, sum sanniliga vóru uppi í friðararbeiðnum her á landi, nú tiga, tá Tjóðveldisflokkurin – uttan um Løgtingið og ímóti andanum í løgtingssamtyktunum – tosar um fund við NATO og møguligan limaskap við Partnership for Peace. Góðu tit, friðarfólk, hvar eru tit nú? Ja, summi yppa øksl og vilja vera við, at tey vóru ímóti kjarnorkudubbingini og kanska ikki so nógv ímóti Mjørkadalsstøðini. Hatta er tvætl! Almenni politikkurin hjá Tjóðveldisflokkinum var, at hervaldið skuldi av landinum. Alt annað er uttanumtos og svik. Jógvan Durhuus er, sum vituligt er, illa við og krevur at løgtingssamtyktirnar skulu virðast. Øll eru altso ikki paralyserað enn, so vón er. Víst broytast tíðir, men…

***Sosialurin***

Viðmerking:

## Ríkissjúkrahúsið einaferð enn

*Rætting og viðmerking til grein hjá Oddvør Johansen*

Dan R. Petersen, løgtingsmaður, hevur dittað sær í bløðunum at vísa á, teir stóru fyrimunir vit føroyingar hava av at fáa læknaliga serhjálp, fyrst og fremst á Ríkissjúkrahúsinum, og aðrastaðni við í Danmark, har serkunnleikin nú einaferð er at finna, tá okkara egni læknaførleiki ikki røkkur. Og hetta hevur fingið Oddvør Johansen at taka til orðanna. Dan og Oddvør eru annars púra samd um, at Ríkissjúkrahúsið eigur lívið í mongum føroyingi, men so røkkur semjan ikki longur. Oddvør fer at tosa um skitnu vápnini, sum andstøðan nýtir „sum dømi um sambandsins herligheitir“, sum hon so spotskliga tekur til - og greiðir frá einum persónligum dømi, tá hon var stødd á Ríkissjúkrahúsinum við einum av hennara nærmastu. Eftir at allar kanningar vóru gjørdar, hendi kortini einki. Tá tey fóru at ótolnast, var svarið frá yvirsjúkrasystrini, at bíðað var eftir pengum úr Føroyum. Og hetta svar leggur Oddvør út, sum um vit gjalda fullan kostnað fyri ta viðgerð, sum okkum føroyingum verður veitt á Ríkissjúkrahúsinum. Jú, hetta er ein partur av sannleikanum, men ikki allur sannleikin.

Allir føroyingar vita, at heildarveitingin úr Danmark er árliga um 1300 mill. kr. Og av hesum fara umleið 30 mill. aftur til Ríkissjúkrahúsið, t.v.s. at danir fáa 2,3% aftur av ríkisveitingni, sum sjúklingagjald fyri teir umleið 1000 sjúklingarnar úr Føroyum, sum, tíverri, mugu ta longu leið til Danmarkar at fáa serviðgerð, og er onki løgið í hesum, uttan tað, at fleiri føroyingar við landsstýrisfólkunum á odda, (og nú eisini Oddvør Johansen!) ganga og trútta niður í okkum, at vit gjalda fullan prís fyri hesa viðgerð - jú, gaman í, vit fáa 1300 mill. sum ískoyti til at reka okkara samfelag fyri, og av hesum gjalda vit umleið 30 mill. aftur til Danmarkar fyri serlæknaviðgerð har - so einfalt er tað! Hetta er onki meiri enn rímiligt gjald (við donskum kr.!) fyri serviðgerð á einum av bestu sjúkrahúsum her á okkara leiðum - og sama gjaldsskipan, mótvegis Ríkissjúkrahúsinum, er galdandi fyri donsku amtini.

Fyri betur at lýsa sjúkrahúsgjaldið til Danmarkar, so kunnu vit bert kaga aftur í gomlu afturberingarskipanina (refusiónina) úr Danmark. Um vit t.d. taka triðseinasta árið, tann skipanin var í gildi millum Føroyar og Danmarkar, so sóu tølini soleiðis út av inntøkum sjúkrahúsanna í 1985:

a.. Ríksins partur 97.890,- mill. kr. = 54,9%

b.. Landskassans partur 80.508, - mill. kr. = 45,1%
Hesi tøl vísa greitt, hvør bar bróðurpartin av samlaðu sjúkrahúsútreiðslunum tá, meðan tað er straks torførari í dag at finna út av, hvør hevur goldið hvat, tí síðani



1988 er allur danskur stuðul endaður í stórapotti, t.v.s. í blokkinum. Og syrgiligt er at ásanna, at føroyskir politikkarar, sum, tíverri, mugu vit siga í dag, fingu fullan ræðisrætt yvir donsku heildarveitingini, hava gjarað út til alt annað , enn tað, sum hon upprunaliga var ætlað til, nevniliga, sjúkrahúsverkið, almannaverkið og skúlaverkið, og hygg, hvussu støðan er innan hesi verk í dag, t.d. sjúkrabilarnir!!

Gjaldast skuldi frammanundan skurðviðgerðini á Ríkissjúkrahúsinum, sigur Oddvør, annars kundi onki gerast - peningur var sjálvandi tøkur! Men formella flytingin av pengunum úr Føroyum var ikki í lagi, og tað er ein heilt annar spurningur, sum hevur okkurt við vánaliga og inneffektiva føroyska landsumsiting at gera. Tí pengarnir vóru vissuliga komnir úr Danmark til Føroyar, men tað gekk verri at fáa bert ein evarska lítlan brotpart suður aftur haðani, teir vóru komnir frá upprunaliga, nevniliga úr Keypmannahavn - og tí vóru tað fimm langir dagar at bíða í 1995 fyri tykkara viðkomandi har niðri.

Eisini skoytir Oddvør so hissini uppí, at tá ið á stendur, so kunnu vit sjálvsagt eisini fara aðrastaðir enn til Danmarkar at søkja okkum heilsubót - sjálvandi kunnu vit tað. Men hesin spurningurin er als ikki so einfaldur, sum hon vil gera hann til. Í eini álvarsligari sjúkrastøðu, sum altíð er ein torfør støða at vera í, bæði hjá sjúklingi og teirra avvarandi, har er einki at taka seg aftur í, at vit føroyingar hava alstórar fyrimunir málsliga, har hava flestu okkara vinir og kenningar o.s.fr., tá farið verðurtil Danmarkar, heldur enn til onnur lond - og ta støðuna átti ein rithøvundur at duga at sett seg inn í.

Og at danir eru so ónøgdir við sjúkrahúsverkið, sum Oddvør vil vera við, tað var so dyggiliga mótprógvað í almannakunngjørdari heilsuverkskanning frá „Sosialforskningsinstituttet“ fyri fáum mánaðum síðani. Men, sum ikki einaferð, tað ræður um at vera við í nationala fagnaðarkórinum, sum sær reytt, bert talan er um danskt og Danmark!

Jú, sanniliga, tað er onki skeivt at siga: Enn hava vit møguleikan at koma á Ríkissjúkrahúsið!

**Johan Samuelsen**

## Kvinnur fráveru 11. hvønn dag

Vinnuhúsið skrivar, at hækkandi sjúkrafrávera hjá arbeiðarum fær ta samlaðu fráveruna at hækka, vísa nýggj donsk hagtøl. Síðsta ár vóru kvinnuligir arbeiðarar vekk frá teirra arbeiðsplássi 11. hvønn arbeiðsdag - í miðal. Frá 1998 til 1999 hækkaðu árligu fráverudagarnar úr 20 til 21. Tað er heldur hægri persónlig frávera, sum hevur ført til, at fráveran hjá kvinnuligum arbeiðarum svarar til talið av arbeiðsdøgum í einum mánað. Harafturímóti er barnsburður og 1. sjúkradagur hjá barninum ein sindur minni av fráveruni.

Tað er tey nýggju fráveruhagtølini fyri 1999 hjá tí Danska Arbeiðsgevarafelagnum, sum skjalprógva sjúkrafráveruna. Í mun til 1998 vísa tølini ein lítla hækkan í tí samlaðu fráveruni á tí privata arbeiðsmarknaðinum. Sjúkrafráveran og tann samlaða fráveran hækkaði eisini eitt sindur fyri mannligar arbeiðarar í 1999. Teir vóru í miðal vekk frá arbeiðsplássinum 18. hvønn arbeiðsdag, tá ið frítíðin ikki verður tald við.

### Hækkandi persónlig sjúkrafrávera

Sjúkrafráveran hjá teimum kvinnuligu arbeiðarunum hækkaði frá 1998 til 1999 úr 5,8 til 6,4 prosent av teirru samlaðu fráveru á 9,3% av arbeiðstíðini - svarandi til ein sjúkradag meira um ári.

Hinvegin fall barnsburðarfarloyvi (til 1,7 %), meðan frávera orsakað av 1. sjúkradegi hjá barninum var óbroytt (á 0,3 %).

Hjá mannligum arbeiðarum hækkaði sjúkrafráveran eisini eitt sindur, úr 5,4 til 5,6% av arbeiðstíðini - grundað á bæði meira sjúkrafráveru og meira frávera orsakað av 1. sjúkradegi hjá barninum (sum nú er 0,2%).

### Hækkar í einum hákonjunkturi

Eldri DA-sundurgreiningar vísa, at sjúkrafrávera typiskt hækkar í einum hákonjunkturi. Sum ein tummilfingraregul økir eitt fall í arbeiðsloysinum á 1 % sjúkrafráveruna millum arbeiðarar við 4% , men ávirkar ikki fráveruna hjá starvsmonnum.

Ein av fleiri møguligum frágreiðingum um hesa konjunkturávirkan kann vera, at eitt fall í arbeiðsloysinum ger, at ein eitt sindur veikari partur av arbeiðsstyrkini kemur í arbeiði.

### Arbejdsgevaragjald broytir ikki

Ein onnur DA-sundurgreining vísti fyri nøkrum árum síðani, at bæði longdin og tali av sjúkratíðarskeiðum í royndum ikki hevur samband við, hvussu fáar ella nógvar vikur arbeiðsgevarin rindar sjúkradagpening ella løn undir sjúku.

Hinvegin merkja tey fíggjarligu viðurskiftini hjá arbeiðarunum rættiliga nógv fyri vavið av sjúkrafráveruni:

Tá ið karensdagarnir vórðu avtiknir í 1987 og tað arbeiðsgevaragoldnað tíðarskeiðið stytt úr 13 til 5 vikur, viðførdi tað eina hækkan á 22 % í talinum av sjúkratíðarskeiðum hjá arbeiðarum.
(Kelda Vinnuhúsið)



# - Viðurkenning er besta kenningin



*Oddfríður Marni Rasmussen fær virðislønina handaða í Sjónleikarhúsinum. - Viðurkenning er tann besta kenningin, segði hann aftaná*

**Mynd: Jens Kr. Vang**

Stefan í Skorini

Tann virðislønin, sum kanska mest spenningur er um millum fólk undan handanini, er fyri fagrar bókmentir. Í ár var tað sandoyingurin Oddfríður Marni Rasmussen, sum varð heiðraður og fekk viðurkenning frá nevndini, sum avgerð, hvør skal hava virðislønina.

Oddfríður gav fyri stuttum út yrkingasavnið „Rás Sár“, og hetta savnið verður mett av nevndini at vera heiðurslønarvert. Á samkomu í Sjónleikarhúsinum fekk Oddfríður handað virðislønina.

Í grundgevingini fyri at júst Oddfríður skuldi hava virðislønina segði nevndin, at „Oddfríður er skald, ið leitar sær rás, sárur og ivingarsamur, á markinum millum heimloysi og heimlangtan. Í yrkingarsavninum „Rás Sár“ ferðast hann víða í nýroyndum sínum og vísir, serstakliga í prosayrkingunum, á nýggjar leiðir í føroyskum skaldskapi“.

### Nógv at týða

Oddfríður segði eftir at hava fingið heiðurslønina, at ein slík heiðursløn sjálvsagt hevur nógv at týða fyri hann sum yrkjara.

– Virðislønin hevur nógv at týða fyri meg. Hetta merkir, at onkur lesur bókina, eg havi skrivað, og dámar hana. Hon verður av tí sama eisini lisin og keypt, sigur Oddfríður.

Oddfríður segði eisini, at tað er týdningarmikið at fáa viðurkenning, tí tað er ein fín kenning, um hon bara ikki setur í høvdið, leggur hann skemtandi afturat.

Umframt viðurkenningina fær Oddfríður eisini ein kekk á 20.000 krónur, og tað kemur sjálvsagt eisini væl við, tí um man vil tað ella ikki, so eru pengar frælsi, sigur vinnarin.

Oddfríður hevur áður givið út trý yrkingarsøvn, og hetta er tað fjórða, hann letur úr hondum. Hetta er fyrstu ferð, at honum verður latin heiðursløn fyri stríðið. Hann hevur heldur ikki hugsað sær at steðga nú, men ætlar sær at halda fram á somu leið sum higartil.

Hann hevur ætlanir um at geva út antin eitt stuttsøgusavn ella eitt yrkingarsavn undan jólum. Hann heldur tó, at tað fer at vera torført at fáa alt liðugt til tað tíð, men hann miðar ímóti eini útgávu, áðrenn árið er runnið.

### Kundu givið fleiri

Oddfríður metir, at nevndin væl hevði kunnað heiðrað fleiri yrkjarum ella rithøvundum.

– Hetta er eitt avbera gott tiltak, men tað er eitt sindur keðiligt, at bara ein virðisløn verður latin fyri fagrar bókmentir, sigur Oddfríður.

– Tað kundu kanska verið tvær latnar, so man hevur eitt sindur av mótspæli og okkurt at halda seg til.

Leivur Hansen, býráðsformaður, segði undan handanini, at um nevndin ikki metir, at nakar hevur uppiborið eina virðisløn, so kann hon velja ikki at lata nakra, og tað heldur Oddfríður eisini er fínt.

Oddfríður segði eisini, at hetta kom óvart á hann, og hann hevði als ikki væntað at fáa virðislønina, tá boðini komu fyri góðari viku síðani.

Eftir handanina helt Oddfríður eina røðu fyri áhoyrarunum. Oddfríður hevur verið á rithøvundaskúla í Danmark í tvey ár, og hesi árini metir hann sera høgt. Har var eitt veruligt forum fyri rithøvundar, og teir tosaðu um skaldskap tvørturum bókmentagreinar. Eitt slíkt forum heldur Oddfríður avgjørt vantar í Føroyum. Tað, sum rithøvundar mest tosa um, tá teir koma saman, er mentunarpolitikkur, og tað er harmiligt.

- Føroyskum skaldskapi tørvar harðliga eitt slíkt forum, sigur Oddfríður at enda.

# Rigmor, Zakarias og Effie fingu hinar

*Fýra virðislønir vórðu latnar tilsamans, og hinum trimum fóru Rigmor Restorff, Zakarias Wang og Effie Campbell avstað við*

Stefan í Skorini

Umframt virðislønina fyri fagrar bókmentir vórðu M.A. Jacobsen virðislønir latnar fyri serligt mentanaravrik og yrkisbókmentir. Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs varð eisini latin í hesum sambandi. Allar virðislønirnar eru á 20.000 krónur.

Fyrst á pallin trein Zakarias Wang. Hann fekk virðisløn M.A. Jacobsens fyri yrkisbókmentir fyri bókina „Føroyar á vegamóti“. Í grundgevingini segði nevndin, at hetta var „týdningarmikið søguligt tilfar um støðu Føroya í heimssamfelagnum“. Zakarias helt røðu, har hann var glaður um, at hansara bók var heiðurslønarverd. Hann legði afturat, at bókin „Føroyar á vegamóti“ gav M.A. Jacobsen sjálvum rætt í tí sjálvstýriðsstríðið, sum hann stóð fyri.

Rigmor Restorff fekk M.A. Jacobsens virðisløn fyri mentanaravrik. Nevndin segði, at „Rigmor fær virðislønina fyri drúgva virki sítt sum tónlistafólk“. Rigmor helt onga langa talu, men takkaði fyri. Hon var tann, sum fekk flest lógvabrestir frá fjøldini.

Effie Campbell fekk Barnabókaheiðursløn Tórshavnar býráðs. Nevndin segði, at hon „hevur sæð tað neyðuga í, at vit innan kristnar bókmentir hava so virknan týðara sum Effie Campbell, ið við sínum skýmingarløtusøgum hevur ein greiðan boðskap“.

Bókmentavirðisløn M.A. Jacobsens varð fyrstu ferð latin í 1958, og tá varð bara ein latin. Í 1972 vórðu tvær latnar. Ein fyri fagrar bókmentir og ein fyri yrkisbókmentir.

Í 1996 kom enn ein virðisløn uppí part. Tað var virðisløn fyri serligt mentanar avrik, og nú eru tríggjar M.A. Jacobsen virðislønir. Barnabókaheiðurslønin hevur verið latin síðan 1976.

Í fjør vórðu allar virðislønirnar javnsettar, og tær eru nú 20.000 krónur.



*Tey fýra, sum fingu virðisløn. Frá vinstru Oddfríður Marni Rasmussen fyri fagrar bókmentir, Rigmor Restorff fyri mentanaravrik, Effie Campbell fyri barnabókmentir og Zakarias Wang fyri yrkisbókmentir*

**Mynd: Jens Kr. Vang**